Tíðindablaðið
sosialurin
Internet: www.sosialurin.fo

**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov

**Marknaðardeild:** Jonhard Hammer, Dagbjørt S. Hansen
**Blaðfólk:** Áki Bertholdsen, Turið Kjølbro, Dánjal Højgaard, Dagfinn Olsen, John Johannessen, Sveinur Tróndarson, Eyðun Klakstein, Høgni Mohr
**Ítróttur:** Jákup Mørk

**Myndamenn:** Jens Kristian Vang, Álvur Haraldsen
**Útgevari, uppseting:** Sp/f Sosialurin
**Bústaður:** Argjavegur 26, Argir

**Postadr:** Postsmoga 76, 110 Tórshavn
**Telefon:** 311820
**Telefax.** 314720
**e-mail:** post@sosialurin.fo
**Lýsingar:** lysing@sosialurin.fo
**Prent:** Sosialurin

# Frá landsstovni til deild

## *Oddagrein*

Herfyri var nýggjur Landsverkfrøðingur settur. Tað skal sjálvandi verða ynskt tillukku frá hesum stað, men tilgongdin øll hevur verið sera løgin og tað undrar ikki sørt, at hettar mál ikki hevur fingið avleiðingar fyri Vinnumálastýrið ella landstýrismannin. Eitt minstamark av hegni má verða kravt frá einum føroyskum stýri.

Tá undanfarni landverkfrøðingur varð uppsagdur eftir nógv ára trúgva tænastu, skuldu Landsverkfrøðingurin og Strandferðslan leggjast saman. Fólk frá Vinnumálastýrinum komu á dyr á Landsverksfrøðingsstovninum við nýggjum stjóra í skapi av strandferðslustjóranum, men máttu broyta ætlan, tí hendan ætlan als ikki var gjøgnumhugsað og heldur ikki bar til, hóast tað óivað hava verið fólk við góðum prógvum og drúgvum royndum aftaná hesi prógv, ið stílaðu fyri. Hendan grova feilvurdering av støðuni átti at elvt til broytingar í Vinnumálastýrinum ella til at Finnbogi Arge tók onkra avleiðing av hesum. Avleiðingar eru eftir øllum at døma fyri øll onnur enn Landstýrimannin í Vinnumálum og stýri hansara, og ístaðin fyri at viðganga, at hava gjørt eitt mistak, so lata teir sum um, at málið er handfarið skilagott og professionelt, hóast veruleikin er ein annar. Fakta er, at samanleggingin millum Strandferðsluna og Landsverkfrøðingin varð av ongum, og nú fer Vinnumálastýrið ein heilt annan og óivað skilabetri veg viðvíkjandi SL. Tað tykist sum um, at Landstýrismaðurin í Vinnumálum og stýri hansara ikki leggja í hvønn veg bilurin koyrir, so leingi teir sleppa at sita við róðrið.

Hvat fer nú at henda við landsverksfrøðingsstovninum? Vit hava eina strandferðslu, ið fær eina játtan uppá meira enn 50 milliónir á fíggjarlógini og hevur eina fíggjarætlan, ið javnvigar við væl yvir 100 milliónum, men ikki ber til at finna 1,8 millión uttan, at politiska skipanin skal mobiliserast. Eitt minstamark av felksibiliteti eigur at kunna krevjast av einum landsstovni. Er talan harafturímóti um eina deild undir Vinnumálastýrinum, so er skilligt, at umrokeringar í fíggjarætlanum ikki bera til, uttan at farast má til hægsta stað. Men er hettar støðan í dag, so er gingið í ring viðvíkjandi Strandferðsluni. Fyrr í tíðina var "administrator" heitið á tí, ið stjórnaði Strandferðsluni. Eftir hettar fekk man stjóra, og synd hevði verið, um man nú vendir aftur til administrator, ið ikki tekur avgerðir og mennir, men bíðar eftir boðum úr hægri stað viðvíkjandi eitt nú upphæddum uppá minni enn 2% av samlaðu fíggjarætlanini, ið var alt ið kravdist til leigan av hóskandi suðuroyarskipi. Landsverksfrøðingsstovnurin hevur altíð verið ein sera sjalvstøðugur stovnur, ið eigur sín stóra part av menningini av hesum samfelag. Synd hevði verið, um hesin stovnur gjørdist meinlíkur eini deild undir Vinnumálstýrinum, har leiðslan fær trongar karmar at virka undir og harafturat ikki fær tekniskt mótspæl frá stýrinum.

Vit hava á hesum stað eftirlýst einari lýsing av eitt nú Vinnumálastýrinum á sama hátt sum Landsverksfrøðingsstovnurin varð lýstur herfyri, men einki er komið úr Vinnumálastýrinum ella Landstýrinum. Landsins hægsta stað eigur at ganga á odda sum fyrimynd fyri stovnar og borgarar annars, og tí tykist tað heldur óskilligt, at ein lýsing av tí tilfeingi og bygnaði, ið við hegni og skili skal verða við til at skapa framburð og menning í hesum samfelagi, ikki verður gjørd. Ein slík lýsing við eitt nú starvsaldri eftir loknari útbúgving hjá lyklastarvsfólki hevði óivað endurstovnað álit á handfaringarevnini hjá Finnboga Arge og pørtum av umsiting hansara, ið hava verið sera ivasom serstakliga í omanfyrinevnda máli. Vónandi fáa vit í framtíðini eina politiska leiðslu, ið torir at fara til botns í omanfyrinevnda máli.

***Sosialurin***

Viðmerking:

# Gevið dreingjunum frið

Sambært fjølmiðlunum fór næstseinasta vikuskifti ein ógvuliga løgin og óskiljandi hending fram í Klaksvík.

Nakrir smádreingir høvdu tikið seg inn í eini sethús, sum í løtuni stóðu tóm, hjá einum skyldmanni hjá einum av dreingjunum. Har funnu teir brennivín, vápn og lóður. Og nú hendi tað løgna, sum eingin skilir. Dreingirnir løgdust á brennivínið og fóru at skjóta skilaleyst út gjøgnum vindeyga í húsunum.

Fjølmiðlarnir hava sakliga greitt frá hendingini og hava roynt at varpa ljós á hana frá ymsum hornum. Klókar kvinnur og klókir menn hava sagt sína hugsan um gátuføra atburðin hjá smádreingjunum. Psyk. dit og cand. dat hava gjørt sínar úrskurðir. Slíkt átti ikki at kunna komið fyri í Føroyum. Og ikki má slíkt henda aftur, men ilt er at byrgja uppfyri. Barnaverndarnevndirnar eru jú mannaðar bert við vanligum fólki. Ikki kann krevjast av teimum, at tey skulu hava skil fyri slíkum fløktum spurningum.

Eg minnist meg sjálvan, sum smádrong, standa undir vegginum á einum tómum húsum saman við øðrum dreingjum ein seinnapart. Hvør ið blakaði fyrsta steinin skal vera ósagt. Kanska var tað hann, sum hevði mest trongd til at gera seg upp. Tað tók ikki langa løtu til ikki heilur rútur var eftir í húsunum. Og har var einki brennivín uppií. Ikki veit eg um at nakar av okkum, sum var við, seinni gjørdist ólukkudýr, ella sosialur tapari, sum tað so fínt eitur nú á døgum. Vit komu heldur ikki í kløurnar á »systeminum«. Um vit høvdu tað, ivist eg ikki í at í hvussu so er onkur av okkum hevði havt ilt við at fóta sær aftur.

Tá hugsað verður um aldurin á dreingjunum hava teir ikki sýnt nakra sum helst ónormala atferð. Tvørturímóti! Og teir vita fullvæl hvat teir hava gjørt og teimum tørvar onga rættleiðing ella at verða tyktaðir. Og allar minst tørvar teimum »viðgerð«. Latið dreingirnar fáa frið at koma fyri seg aftur av traumatisku hendingini og at læra seg at liva við henni.

Hendingin kundi havt ógvusligar og syndarligar avleiðingar við sær og er at frøast um, at so ikki varð.

Fyri dreingirnar hevur hendingin revsingina í sjálvari sær, men um tey vaksnamannafólk, sum hava vápn, lóður og brennivín standandi í tómum húsum, ikki skuldu fingið homlubandið skal vera ósagt.

**A. Guttormur Djurhuus**

# Rutuupplýsingin hjá SL

**Ein viðmerking til tað, sum alment hevur verið frammi um, at Claymore sigldi undan ferðandi av Tvøroyri og um rutuupplýsingina hjá SL**

Tað hevur verið ein ávís almenn umrøða av, at Claymore sigldi undan nøkrum ferðandi á Tvøroyri mikumorgunin tann 31. mai 2000. Eisini er í Sosialinum tann 2. juni 2000 gjørdar viðmerkingar í oddagrein um, hvussu rutuupplýsingin hjá SL virkar. SL skulu her gera nakrar viðmerkingar til hendingina:

Tá ferðaætlanin fyri Claymore varð sett upp, vóru nógvir spurningar, hvussu siglingin skuldi tilrættaleggjast og annars, hvussu skipið kom at nøkta flutningstørvin. Tá lýst varð í bløðunum, varð mett, at tað varð ikki rætt at leggja seg fast á broytingar á farleiðini um halgidagarnar – m.a. tí, at møguliga varð neyðugt at sigla um náttina o.a.

Á heimasíðuni varð hóast hetta gjørdar viðmerkingar um broytingar, tvs. tær somu sum, tá Smyril er í sigling. Harafturat hava starvsfólkini á rutuupplýsingini tlf. 343030 upplýst hesa broyting mikudag, t.e. at siglt verður sum fríggjadag við fráferð kl. 06:00. SL metti, at tá tað ikki valdaði ruðuleiki í flutningium, kundi SL halda seg til vanligu broytingarnar, sum verða gjørdar um halgidagar - tað mótsatta varð heldur ikki fráboðað.

Tað er tí ikki rætt, sum stendur at lesa í Sosialinum, at starvsfólkini á rutuupplýsingini í Tórshavn onki vistu um broytingarnar og tí upplýstu kl.07:00. Á kunningarstovuni á Tvøroyri varð eisini upplýst, at siglt varð sum fríggjadag.

Annars er talan um broytingar, sum endurtaka seg á hvørjum árið. Tað vóru eisini 64 ferðandi við Claymore henda morgunin, so rutuupplýsingin kann ikki hava virka so illa sum onkur vil gera tað til og fáa dumpikarakter av Sosialinum.

Tað, sum kundi verði gjørt betri er fylgjandi: Ferðaætlanin hjá Claymore kundi verði lýst einaferð afturat í bløðunum saman við broytingunum. Upplýsast kann, at dagliga avgreiðir einstaka starvsfólki í rutuupplýsingini umleið 200-250 uppringingar. Hetta svarar til, at eitt starvsfólk avgreiðir árliga um 40-50 tús. uppringingar. Harafturat flyta strandfaraskipini umleið 850 tús. fólk árliga. Viðmerkjast kann eisini, at dagliga eru nógvar hundrað fráferðir og komir bæði hjá ferjum og bussum, sum aftur krevur góða samskipan. SL ætlað framyvir at gera meira brúk av teimum stóru møguleikum, sum internetið gevur. Arbeitt verður eisini við einari tøkniligari umlegging av tekstvarpinum. Arbeitt verður eisini við øðrum betringum, eitt nú at gera eina langtíðarferðaætlan, herundir leggja so fá frávik í ferðaætlanina sum yvirhøvur møguligt og eisini uppá longri sikt hava somu komu- og fráferðartíðir á ymsu farleiðunum.

At Sosialurin brúkar eina einstaka hending sum hesa í einari politiskari viðgerð og í einari oddagrein, verða ongar viðmerkingar gjørdar til. Hendingin verður eisini blandað saman við játtanarreglum og leigumálinum av Claymore. Leiðslan á SL varð í januar greið yvir, at varð skip leiga og stórar umvælingar gjørdar uppá Smyril, fór peningur við vissu at vanta í seinni í ár ? talan er nevnliga um sera stórar upphæddir, sum skulu brúkast uppá Smyril, tilsamans 4-5 mió. kr. Vitandi um, at peningurin kom at vanta í, vísti leiðslan á, at tað rættasta, eftir stýrisskipanarlógini, var at fáa neyðuga peningin til vega. SL setti longu í mars 1999 pening av til umvæling av Smyrli og leigu av avloysaraskipi á fíggjarætlanini fyri ár 2000. Síðan velur Tingið í desember at skerja játtanina við 7,5 mió. kr.



Viðmerkjast kann, at Sosialurin hevur ikki havt samband við nakað leiðandi ella ábyrgdarhavandi starvsfólk á SL um hendingina. Ein kritiskur succesfaktorur hjá SL er at geva rættar og skjótar upplýsingar. Tað er tí ein stór avbjóðing at minimera feilir, hvat rutuupplýsing viðvíkur. Málið er m. a., at so nógvir málbólkar sum gjørligt fáa nøkta sín serliga upplýsingartørv. Leiðslan á SL er av tí áskoðan, at verða misstøk gjørd, so eigur alt at verða gjørt fyri at rætta hesi og annars arbeiða fyribyrgjandi.

**Reidar Nónfjall**
**Stjóri á Strandfaraskipum Landsins**

†

Kunngjørt verður fyri ætt og vinum at elskaði maður mín

**BENJAMIN CLEMENTSEN**
Sandur

andaðist í Ålesund 28. mai 45 ára gamal.

Jarðarferðin verður úr Sands kirkju týsdagin 6. juni kl. 13.00, sungið verður úr sálmabókini.

*Familjunnar vegna*
**Anni**

Tey, ið vilja minnast Benjamin, kunnu lata eina peningagávu á konto í Føroya Banka.



# ÚF og Pegasus farin í samstarv

*Útvarp Føroya hevur gjørt avtalu við Studio Pegasus í Klaksvík, um at fyritøkan skal gera sending fyri ÚF fýra tímar hvørt sunnukvøld*

SVEINUR TRÓNDARSON & JAN MÜLLER

Fríggjadagin gjørdu Jógvan Jespersen, stjóri í ÚF, og Steintór Rasmussen, stjóri í Studio Pegasus, samstarvsavtalu, sum inniber, at Studio Pegasus, hetta til endan av august mánaði, fer at senda fyri ÚF fýra tímar hvørt sunnukvøld.

Byrjað varð longu sunnukvøldið, nú Norðoyastevna varð í Klaksvík um vikuskiftið.

Jógvan Jespersen, stjóri í ÚF, sigur við Sosialin, at hetta samstarvið, sum er gjørt millum ÚF og Studio Pegasus, er eitt royndarsamstarv, sum í fyrsta umfari fer at ganga til endan av august mánaði.

- Vit fáa nógv tilboð um freelance sendingar millum ár og dag, men í hesum føri hava vit valt at fara inn í eitt royndarsamstarv, tí tilboðið var skilagott, sigur Jógvan Jespersen.

Hann vísir á, at uppskotið hjá Pegasus vísti beinleiðis til, hvussu sendingarnar skuldu setast saman og gerast, og tí var tað serliga áhugavert.

Jógvan Jespersen sigur annars, at ÚF er farið inn í samstarvið við tí í huga, at samstarvið skal fíggjast við lýsingum og eykainntøkum. Av tí at so stutt er fráliðið hevur tað tí ikki hevur borið til at fáa allar eykainntøkurnar upp á pláss. Kortini hevur ÚF valt at byrja samstarvið longu nú.

Men er so ikki samstundis ein vandi fyri, at tit taka eksistensgrundarlagið undan bløðunum?

- Tað er møguligt, men hatta er eitt úrslit av nýggju lógunum, sum vit arbeiða undir, og tá vit samstundis skulu fíggja raksturin hjá stovninum við lýsingum og spæli, so kunnu vit ikki gera tað øðrvísi, sigur útvarpsstjórin.

Spurdur um tað ikki er ov galið, at Rás 2 skal vera orsøkin til, at Útvarpið fær sær tað, sum minnir um eina lokalredaktión í Klaksvík, sigur Jógvan Jespersen, at soleiðis sær hann tað ikki.

- Í okkara føri eru umleið 40 prosent av tilfarinum, sum verður sent, gjørt av freelancarum, so tað er ikki tí, at Rás 2 er komin, at vit gera hesa avtaluna, sigur Jógvan Jespersen, stjóri.

- Monopolið varð avtikið við nýggju lógini um kringvarp, og vit eru í ferð við at tillaga okkum til nýggju umstøðurnar, sigur Jógvan Jespersen, sum leggur afturat, at umstøðurnar hjá Útvarpinum at gera avtalur við freelansarar eru avmarkaðar, tí búskapurin hjá stovninum er spentur.

Lønarsamráðingarnar seinast endaðu við eini lønarhækking, sum eftir øllum at døma gjørdist tung fyri Útvarpið. Tí má peningurin finnast aðrastaðni, sigur Jógvan at enda.



*Fríggjadagin var Jógvan Jespersen, útvarpsstjóri, í Klaksvík og gjørdi samstarvsavtalu við Studio Pegasus. Mynd: Jan Müller*

# Fleiri gestir enn vanligt

*Nógvu tiltøkini í Havn høvdu uttan iva við sær, at fleiri full fólk vóru í býnum um vikuskiftið*

SVEINUR TRÓNDARSON

Løgreglan í Havn, hevði sítt at síggja til um vikuskiftið. Ikki tí, at nakað serliga ógvusligt fór fram nakrastaðni, men meira tí, at tað vóru so nógv full fólk í býnum.

- Okkurt smávegis slagsmál hevur verið í býnum, men tað er eisini íkomið av fyllskapi, so tað hevur ikki verið so ógvusligt, sigur vakthavandi á løgreglustøðini í Havn.

Hann váttar annars, at tað hava verið fleiri fólk í klivunum hetta vikuskiftið enn tað vanliga eru, men sigur eisini, at tað uttan iva hongur saman við, at tað hava verið nógv tiltøk í býnum um vikuskiftið.

Annars greiðir hann frá, at ein bilførari varð tikin fyri rúsdrekkakoyring.

**Sosialurin**
*eisini á www.sosialurin.fo*



**Móttøka hjá Kaupthing**

Hin 1. mars 2000 varð Kaupthing formliga virkið í Føroyum. Síðan hava Føroya Sparikassi og Kaupthing hf. í felag stovnað felagið Kaupthing Føroyar.

Kaupthing Føroyar bjóðar fram tænastur innan handil og ráðgeving á virðisbrævamarknaðunum. Ætlanin er eisini at luttaka í uppbyggingini av einum føroyskum virðisbrævamarknaði og við tíðini luttaka í eini væntaðari privatiseringstilgongd í Føroyum.

Áhugin fyri hesum virksemi hevur síðan byrjanina verið sera stórur, og Kaupthing Føroyar er longu nú størsti útbjóðarin av hesum tænastum í Føroyum.

Fyri 14 døgum síðan fluttu vit inn í okkara nýggju høli í bygninginum hjá Sparikassanum við Tinghúsvegin.

Í hesum sambandi bjóða vit øllum áhugaðum til móttøku í nýggju hølum okkara á Tinghúsvegi 14:

**Hósdagin 15. juni kl. 15.00 - 17.00**

KAUPTHING
FØROYAR
Tinghúsvegur 14 • Tórshavn
Tel 351500 • Fax 351501
www.kaupthing.com

SANSIR TEL 355355